# KT-fólk

**Tórshavnar kommuna søkir eftir KT-fólki til KT-deildina.**

**Nakrar av høvuðsuppgávunum**
Arbeiðsøkið er umsiting av skipanum og databasum sum heild, men tú hevur serligt innlit í tær skipanir, sum KT-deildin brúkar (sí „Um KT-deildina"). Tú verður við í samskifti við veitarar um menning av skipanum, herundir at gera kravlýsingar.

**Aðrar uppgávur**
Tú fert at arbeiða í einum toymi, sum umsitur alla kunningartøkni hjá kommununi (teldur, telefoni, prentarar, netútgerð o.s.fr.). Tú fert at manna KT-skivuna (Service Desk) og verður eisini við til at styrkja førleikan hjá okkara brúkarum, herundir politikarum. Økið er í menning, og spennandi avbjóðingar standa fyri framman.

**Førleikakrøv**
Vit leggja dent á, at tú er útbúgvin teldustøðingur. Fyrimunur er at hava royndir við Microsoft-forritum og við tænastuveiting.

**Persónligir eginleikar**
Tú ert røkin, arbeiðir sjálvstøðugt og ert til reiðar at taka eina hond í, tá á stendur.

**Kommunan bjóðar**
Eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum, góðari fakligari og persónligari menning, ein viðhvørt strævnan dag og eitt hugnaligt og inspirerandi umhvørvi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meira at vita?**
Meira fæst at vita um starvið og KT-deildina við at venda sær til Inga Ellingsgaard, KT-leiðara, á tlf. 30 20 10 ella á ingi@torshavn.fo.

**Umsókn og umsóknarfreist**
Umsókn við avritum av prógvum og viðkomandi skjølum skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 13. februar 2009 kl. 12. Viðmerk „KT-starvsfólk" á brævbjálvan.

**Um KT-deildina**
KT-deildin heldur til á Glade Hjørn, og á deildini starvast átta fólk. Deildin umsitur alla kunningartøkni hjá fyrisiting og stovnum í Tórshavnar kommunu. Flestallir kommunalir bygningar eru bundnir í eitt felags net. Í løtuni er talan um 130 bygningar, og umleið 750 teldur og 200 prentarar eru knýtt í fyrisitingarnetið. Servarar okkara eru virtualiseraðir á VmWare, og data verða goymd á SAN. Vit menna áhaldandi okkara Citrix plattform og rulla út á tunnum klientum, og eftirfylgjandi umsita vit restina av teldunum á MS SCCM. Vit umleggja okkara tráðleysa net, so at tað verður tryggari og lættari at umsita. Til at yvirvaka netið brúka vit MS SCOM.

**Tórshavnar kommuna**

# LEIÐARI TIL SANDOYAR BARNAVERNDARTÆNASTU

Samstarvsnevndin fyri Sandoyar Barnaverndartænastu søkir eftir leiðara í til barnaverndartænastuna í ½ tíð.

Arbeiðið umfatar at umsita og leggja til rættis tær ásetingar, ið eru í lógini um barnavernd. Umsøkjari skal í minsta lagi hava eina miðallanga útbúgving innan heilsu, almanna- ella skúlaverk.

Starvið verður at seta sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til formannin í samstarvsnevndini Jákup Martin Sørensen, telefon 21 09 80.

Freistin at søkja er 16. februar 2009.

Umsóknir við ummælum v.m. skulu sendast til:

**Samstarvsnevndin fyri**
**Sandoyar Barnaverndartænastu**
v/ Jákup Martin Sørensen, formaður
Ryggjavegur 5
230 Húsavík

Sandoyar Barnaverndartænasta er eitt samstarv um umsiting av barnaverndarøkinum millum Skopunar- Sandsa- Skálavíkar- Húsavíkar og Skúvoyar kommunur. Í økinum búgva í løtuni 1.440 fólk og av hesum eru 346 børn og ung.

# ÍBÚÐ Á VELBASTAÐ

við 3 sovikømrum til leigu skjótast gjørligt til 5.000 kr/mð. pluss el og olju (uml. 1.800 kr).

Dep & forútleiga. Ring 58 70 30

# Ring og fá eitt tilboð!

Hallur Danielsen
MÚRARIN
tel 509292

WWW.NORMEK.FO
NORMEK
Væl skøddur?
Um ikki, so hava vit røttu dekkini



Tróndargøta 63 · FO-512 Norðragøta
Tlf 442002 · normek@normek.fo

# Burturstødd



Eg eri burturstødd frá 5. februar til mánadagin 22. februar.

**Frisørsalongin hjá Jórun**
tel 44 72 64 Fart. 74 72 64

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val tann 16. mars 2009.

Veljast skulu: eitt umboð fyri Sumba, eitt fyri Porkeri og eitt fyri Hov.

Uppskot um valevni skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi innan 02. mars 2009.

**Suðuroyar Sunnari Sjúkrakassi**

GISTING V/MORGUNMATI · SKEIÐ · FUNDARVIRKSEMI



Hotel Runavík
Sjómansheimið



Tel. 238877 · info@hotelrunavik.fo · www.hotelrunavik.fo